

## Hong Kong er fjølbroytt

- Sjálvt um Hong Kong í dag er ein nýmótans býur, kann ein framvegis finna partar av gamla Hong Kong. Hevur ein ikki hug at ganga runt millum háhúsini og stóru fólkamongdina inni í býnum, kann ein fara út í landsbygdina og til teir smáu fiskibýirnar. Tað er hugnaligt at ganga úti á keiini og síggja fiskimenninar arbeiða ella síggja fólk spæla mahjong millum húsini. Spennandi er eisini at seta seg á eina matstovu, har matarseðilin er skrivaður á kinesiskum, og eingin skilir enskt. Tá kanst tú onkuntíð verða bilsin av, hvat tú fært at eta, sigur Anna Sofía Larsson.

# Anna Sofía livir lív

**- Eg flutti til Hong Kong, tí maðurin fekk arbeiði her sum flogskipari. Vit hildu, tað eisini vera spennandi at búgva í einum fremmandum landi og uppliva eina heilt aðra mentan enn tær, sum vit eru uppvaksin í, sigur Anna Sofía Larsson úr Sørvági, sum í næstan sjey ár hevur búð í Hong Kong**



## Útisetin



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Anna Sofía Larsson er 28 ára gomul og ættað úr Sørvági. Áðrenn hon giftist svianum Mikael Larsson, hevði hon eftirnavnið Hvítklett, og eitt skifti gjørdi hon barnasendingar í Útvarpinum.

### Hvar ert tú stødd?

Eg eri búsitandi í Hong Kong. Vit búgva í einum lítlum øki, sum eitur Discovery Bay á oynni Lantau. Lantau liggur umleið 25 minuttir við ferju frá Hong Kong-oynni.

### Familja?

Gift við Mikael Larsson, og skjótt verða vit ein meira í familjuni. Eg skal eiga okkara fyrsta barn í mai, og tað verður her í Hong Kong.

### Nær flutti tú hagar?

Vit fluttu higar á heysti 2000.

### Hví flutti tú til Hong Kong?

Eg flutti higar, tí Mikael fekk arbeiði her sum flogskipari. Vit hildu, tað eisini vera spennandi at búgva í einum fremmandum landi og uppliva eina heilt aðra mentan enn tær, sum vit eru uppvaksin í.

### Hvat tekst tú við?

Eg passi heim okkara og havi eisini ymisk ítriv sum at binda, svimja og ganga túr í fjøllunum. Hesi árini í Hong Kong hava vit eisini nýtt alla okkara frítíð til at ferðast í. Vit hava ferðast nógva staðni í Asia og eisini gjørt túrar til Afrika, Australia og Amerika. Okkum dámar væl nýggj ævintýr og upplivilsi. Minnini eru nógv og rík. Alt frá at kava við hávum í Malaysia, svimja við delfinum í Amerika, búgva saman vid masaihermonnum og koyra millum leyvir og fílar í Afrika og standa í Mount Everest basecamp á 5200 metra hædd í Tibet.

### Hvussu er við málinum?

Málið sum verður prátað her í Hong Kong er cantonesiskt og enskt. Eg havi lisið cantonesiskt, og ein kann heilt róliga siga, at tað ikki als kann samanlíkast við føroyskt.

Cantonesiskt verdur úttalað í tónum. Eitt orð kann vera úttalað í 6 ymiskum tónum, har hvør tóni hevur eina vissa meining. Til dømis skalt tú siga við onkran: "hetta er mamma mín". Men um tú úttalar orðið mamma í skeivum tóna, kann tað henda, at tú ístaðin sigur: "hetta er hesturin hjá mær". Tí mást tú altíð vera varin við, hvat tú sigur, annars standa fólk bara sum stór spurnartekin.

### Hvat dámar tær í Hong Kong?

Mær dámar væl, at Hong Kong er so nýmótans og internationalt. Eg havi fingið góðar vinkonir her. Summar eru vaksnar upp her, og aðrar koma úr øðrum londum.

Her er eisini ótrúliga vakurt. Tá ið ein hugsar um Hong Kong, sær ein sum oftast háhús fyri sær, men Hong Kong hevur eisini vakrar strendir, smáar hugnaligar oyggjar og høg fjøll. Eitt av mínum yndisítrivum er at ganga ein túr í fjøllunum. Her hava tey gjørt góðar gøtur at ganga eftir og skelti eru sett upp, so ein skal ikki vera bangin fyri at villast.